# Fløðir í gamla kirkjugarði

**Í seinastuni hava nógv fólk varnast, at niðasti partur av gamla kirkjugarði í Havn ofta stendur undir í vatni. Tórshavnar Kommuna er vitandi um trupulleikan, sum verður loystur í vár.**

YVIRFLÓÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tey, sum dagliga spáka framvið gamla kirkjugarði á Svínaryggi í Havn, hava seinastu tíðina lagt til merkis, at niðasti parturin av kirkjugarðinum stendur undir í vatni, tá ið nógv avfall er. Hetta hevur millum annað havt við sær, at fleiri gravir hava verið undir í vatni. Trupulleikin tykist verða ein á, sum rennur undir høvuðsgøtuni í kirkjugarðinum.

**Ógvuliga keðiligt**

Býargartnarin í Havn, Tóri í Hoyvík, sigur, at kommunan er vitandi um trupulleikan, og at tað verður tikið hond um málið í nærmastu framtíð.

– Hatta er ógvuliga keðiligt. Vit hava givið boð um at loysa trupulleikan, og fólk frá kommunui fara at arbeiða við málinum í vár. Eg dugi tó ikki at siga, nær tað heilt nágreinliga verður gjørt, sigur Tóri í Hoyvík.

Hann greiðir frá, at trupulleikin tykist verða, at tey rør, sum í sínari tíð eru løgd at leiða vatnið úr ánni, sum liggur undir høvuðsgøtuni í kirkjugarðinum, burtur, helst eru partvís oyðiløgd, og tí fløðir tað, tá ið nógv avfall er.

– Har er okkurt galið við frárenningini, og vit eru sjálvsagt ógvuliga harmir um, at so er, men málið verður loyst, sigur Tóri í Hoyvík.




*Tað er ikki nøkur hugalig sjón, ið møtir teimum avvarðandi, tá ið tey fara í gamla kirkjugarð at vitja síni kæru, ið liggja grivin har.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*


## Vilt tú verða við til vøkstur og menning?

TRYGD er eitt tryggingarfelag í vøkstri, og fyri at styrkja tænastuliðið, søkja vit eftir ungum søluráðgeva.

**Hvør ert tú?**
Í TRYGD leggja vit størsta dentin á persónligar eginleikar og hugburðin hjá tí einstaka starvsfólkinum. Harnæst koma bókligu útbúgvingarnar og fakligi førleikin.

**Søluráðgevi**
- Tú hevur júst lokið ella ert í holt við seinasta partin av einari miðnámsútbúgving
- Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú kanst samstarva og taka ábyrgd
- Tú ert í bestu árum, ert fyrikomandi og hevur lætt við at seta teg í samband við fólk
- Tú ert málsøkin og opin fyri broytingum
- Tú arbeiðir skjótt, skipað og torir at taka avgerðir
- Tú hevur dyggan handilsligan sans og hevur eitt munagott tænastu sinni

**Vit bjóða**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðingarnar eru nógvar. Høvið er sjálvsagt fyri framhaldandi, persónligari, eins væl og fakligari menning í einum livandi umhvørvi. Sum starvsfólk í TRYGD, verður tú partur av áhaldandi menningini av felagnum og tær persónligu dygdir, ið tú hevur við tær inn í felagið, koma at gera sítt til at TRYGD gerst enn sterkari. Starvið verður sett og lønt eftir serstøkum sáttmála. Arbeiðstíðin er yrkadagar, millum kl. 16.00 og 22.00

**Umsóknir og starvsseting**
Starvið ynskjast sett skjótast tilber, men vit eru eisini sinnað at bíða eftir rætta viðkomandi. Skrivlig umsókn, við curriculum vitae og tilhoyrandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan 15. januar 2006, skal sendast til:

P/F TRYGD
Att.: Ali Celebi
Gongin 7
Postboks 44
110 Tórshavn
Teldupostur: ace@trygd.fo

Trygd · Gongin 7 · Postboks 44 · FO - 110 Tórshavn · Tel. +298 35 81 00 · Fax +298 31 72 11
www.trygd.fo

TRYGD


# Fleiri parkeringspláss í SMS



*Hesi bæði húsini við Tinghúsvegin í Havn eru nú farin í søguna – og í teirra stað koma 70 nýggj parkeringspláss til SMS*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í gjár vóru tvey hús, ið standa vestan fyri SMS á Trapputrøðni í Havn, rivin niður. Talan er um hús, ið SMS hevur keypt, og sum nú eru tikin niður fyri at skapa rúm fyri fleiri parkeringsplássum.

Niels Mortensen, stjóri í SMS, sigur, at arbeiðið er ein partur av útbyggingini í SMS, og at nýggja økið vestan fyri bygningarnar fer at geva eini 70 nýggj parkeringspláss.

**tn**